**Solar Føroyar**

Starvsfólk søkist

Starvið umfatar sølu av el-lutum. Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu og/ella tænastu, dentur verður lagdur á at tú dugir væl at samskifta og er fyrikomandi.
Send umsókn til:

solar FØROYAR

Brekkutún 2
Hoyvík
Tel 35 79 33
Fax 31 78 90
finn@solar.fo

Sosialurin i Sosialurin
Sosialurin Sosialurin

# Lærari frá eftir drúgva tænastu

**Leygardagin skipaði Hovs Kommuna fyri móttøku í skúlanum í samband við, at lærarin í 36 ár, Niels Hovgaard, nú leggur frá sær**

LÆRARASTARV

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eftir trúgva og drúgva tænastu í 36 ár sum lærari í Hovi, leggur Niels Hovgaard nú frá sær. Í hesum sambandi skipaði Hovs Kommuna fyri móttøku í skúlanum í Hovi leygardagin. Nógv fólk legði leiðina fram við at heilsa upp á Niels, nú hann gevst sum lærari.

Niels Olaus Hovgaard er føddur í Hovi í 1947, sonur Magnus Johan Hovgaard og Annu Malenu, f. Jespersen, bæði úr Hovi.

Niels er giftur Majvør, f. Jespersen, av Tvøroyri og búgva tey á Tvøroyri. Niels tók læraraprógv í 1969 á Føroya Læraraskúla og var lærari í Froðba 1969-71 og síðani 1971 hevur hann verið lærari í Hovi. Nú leggur hann frá sær, eftir 36 ár í starvinum og tí skipaði Hovs Kommuna fyri móttøkuni leygardagin, har Niels fekk tøkk fyri tænastu og varð heiðraður við góðum orðum og gávum.



*Niels Hovgaard og konan Majvør. Her avmyndaði í samband við, at Hovs Kommuna leygardagin hevði móttøku, nú Niels gevst eftir 36 ár í lærarastarvinum í Hovi*

*Mynd: D. Olsen*

Fyri 30 árum síðan:

# Kvinnur mótmæltu

6. mars 1977 skipaði Kvinnufylkingin fyri mótmælisfundi á Vaglinum í Havn.

Endamálið við hesum fundi var at lýsa støðuna hjá kvinnuni í samfelagnum og annars vísa á ymiskar skeivleikar, sum okkurt mátti gerast við. Til dømis at bøta um korini hjá kvinnuni á arbeiðsmarknaðinum, líkaløn, avtøku av samskattingini, fleiri barnagarðar og vøggustovur.

Kravgongan byrjaði við Sjónleikarhúsið og helt leiðina oman á Vaglið, har fýra kvinnur høvdu orðið. Umleið 300 fólk luttóku í mótmælisgonguni.




*Kvinnurnar á veg oman á Vaglið, har fleiri røður vóru hildnar*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1977*